## ÍF skal halda fast í oddinum

Ein dystur í meistaradeildini hjá monnum verður á skránni mánakvøldið, tá ÍF tekur ímóti SÍ. Hetta er ein dystur millum topp og botn í meistaradeildini hjá monnum, og undan dystinum er ÍF stórur favorittur. SÍ hevur tó víst, at tær ikki eru til at spæla við. Í Mjølnir-kappingini herfyri komu teir í finaluna, har teir tó taptu ímóti júst ÍF. Dystirnir millum ÍF og Mjølnir hava eisini verið javnir í ár, og serliga í seinna dystinum var ÍF í trupulleikum. At enda dró ÍF tó sigurin í land eftir ein sera spennandi dyst, sum endaði 3-2.

## FSF-aðalfundur útsettur

Í staðin fyri 17. februar skal aðalfundurin hjá FSF nú haldast tann 3. mars. Hesum hevur FSF boðað frá á heimasíðu sínari. At aðalfundurin er útsettur inniber eisini, at freistin at seta fram uppskot til nevndarvalið nú er flutt. Frestin var annars úti í gjár, men henda er nú flutt til 3. februar.

KÍF-Kyndil menn:

# Bæði ætla sær fram í oddin

**KÍF og Kyndil bresta saman í Atlantic Airways deildini hjá monnum leygardagin. Bæði mugu vinna dystin, fyri ikki at missa týðandi fet í stríðnum at røkka heiðursmerkjum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bæði KÍF og Kyndil ætla sær longur upp eftir stigatalvuni, og tí er ein sigur krav hjá báðum.*

Kollfirðingar hava spælt í nýggja høllini hetta kappingarárið, men enn er høllin ikki alment tikin í nýtslu. Leygardagin verður so dagurin, tá høllin, saman við skúlanum og nýggja læknabygninginum, verður vígd. So dysturin ímillum KÍF og Kyndil í Atlantic Airways deildini verður fyrsti almenni dysturin í nýggju høllini í Kollafirði.

Heimaliðið, KÍF, hevur ikki verið til at steðga í endaspælinum í manshondbólti. Í fyrsta dystinum vunnu teir tryggan sigur á Neistanum, sum tá lá á 3. plássi, og í øðrum umfari fekk oddaliðið, VÍF, av at vita í Kollafirði.

Hjá Kyndli hevur verið so sum so í ár. Meistararnir hava ongantíð veruliga fingið gongd á spælið, men seinasta vikuskiftið bragdaði hjá teimum, tá teir vunnu tryggan sigur í slagnum um Havnina.

**Vilja halda fast**
Einasti leikarin, sum manglar hjá KÍF til dystin, er Mirko Milinkovic. Hann hevur verið úti við skaða í eina tíð, og enn er hann ikki blivin klárur aftur.

Karl Johan Djurhuss sigur, at liðið má royna at halda fast um góða spælið, sum tað hevur víst síðstu dystirnar.

- Nú hevur gingið væl hjá okkum í endaspælinum, har vit hava vunnið báðar dystirnar. Nú er umráðandi at halda fast um góðu gongdina, tá vit taka ímóti Kyndli leygardagin.

**Spentir til heksaketlin**
Hjá Kyndli noyddist Høgni Klein av vøllinum við skaða í dystinum ímóti Neistanum. Hann verður tó klárur til dystin móti KÍF, so einasti leikarin, sum manglar hjá Kyndli, er, Hans Arni Thomsen, sum hevur brotið beinið.

Hjalti Jacobsen sigur, at hvør einasti dystur nú er serstakliga týðandi hjá Kyndli.

- Tað var sera týdningarmikið at vinna á Neistanum síðsta vikuskiftið, so nú skulu vit royna at halda fast. Hvør dystur er sum ein finala, tí vit hava ikki ráð at tapa nakran dyst.

Hann sigur seg eisini vera spentan til dystin leygardagin.

- Eg vænti, at tað verður spennandi í Kollafirði. Tað verður sum at spæla í einum heksaketli, tí KÍF hevur helst bestu áskoðarar í landinum.

Neistin-StÍF menn:

# StÍF kann hótta oddaliðið

**Vinnur StÍF dystin ímóti Neistanum sunnudagin, so kunnu teir hótta oddasessin hjá VÍF. Hjá Neistanum ræður um at koma í gongd, eftir at liðið ikki hevur vunnið í 5 dystir á rað**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Neistin hevur fingið eina alt annað enn góða byrjan uppá endaspælið í hondbólti hjá monnum. Teir hava tapt fyrstu tveir dystirnar ímóti ávikavist KÍF og Kyndli, so nú mugu teir royna at fáa nøkur stig á kontoina, um teir skulu gera sær vónir um at røkka heiðursmerkjaplássum.

Hjá StÍF hevur gingið heilt hampiligt. Teir taptu fyrsta dystin í endaspælinum ímóti oddaliðnum í Vestmanna, men í næsta dystinum vunnu teir tryggan sigur á hoyvíkingum. Teir liggja í løtuni á einum øðrum plássi, og vinna teir dystin sunnudagin, so kunnu teir hótta oddasessin hjá VÍF.

Hesi liðini hava leikt tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum í grundspælinum, og munurin hevur ikki verið stórur. Í báðum førunum hevur StÍF tó vunnið dystin, men munurin í báðum dystunum var bert eitt mál, so áskoðararnir kunnu vænta ein spennandi dyst í høllini á Hálsi sunnudagin.

Her skal StÍF royna at halda fast um góðu støðuna í oddinum í bestu mansdeildini, meðan Neistin skal royna at vendu keðiligu gongdini hjá felagnum, har teir ikki hava vunnið í 5 teimum seinastu royndunum í bestu mansdeildini.

H71-VÍF menn:

## VÍF skal aftur á beint

**H71 tekur í vikuskiftinum ímóti oddaliðnum, VÍF, í Atlantic Airways deildini hjá monnum. VÍF hevur ikki havt stórvegis trupulleikar við H71 í ár, og tí eru teir stórfavorittur undan dystinum**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

VÍF fekk ein ordiligan framman á, tá teir møttu KÍF í Kollafirði síðsta vikuskiftið. Oddaliðið tapti stórt, og nú skulu vestmenningar royna at fáa gongd á aftur spælið.

Eisini H71 tapti stórt síðsta vikuskiftið, tá teir vitjaðu hjá StÍF á Skála. Tí skulu teir eisini royna at fáa rætta spælið, men tað verður trupult hjá botnliðnum, sum fær vitjan av oddaliðnum úr Vestmanna.

H71 hevur ikki havt ta bestu gongdina ímóti VÍF í ár. Tvær ferðir hava liðini møtt hvørjum øðrum í grundspælinum, og í báðum førum hava vestmenningar vunnið rættiliga trygt. Fyrri dysturin, sum var í Hoyvík, endaði við einum 4 mála sigri til VÍF, meðan ongin ivi var í seinna dystinum. Tá vann VÍF nevniliga stórsigur.

Eingin ivi er um, at H71 fer at fáa tað trupult ímóti VÍF. VÍF hevur havt takið á teimum í ár, og tí eru vestmenningar eisini stórfavorittar hesaferð. H71 hevur tó víst, at teir kunnu klára seg ímóti øllum, so spennandi verður at síggja, um teir megna at steðga oddaliðnum.